HAGTALSGRUNNURIN

# GOYM FYRISPURNING

HAGSTOVA FØROYA

# Endamál

Brúkar tú somu hagtøl regluliga og ynskir at síggja eina dagførda útgávu, kanst tú goyma valda fyrispurningin.

Goymir tú fyrispurningin, sleppur tú undan at leita fram og velja tølini í Hagtalsgrunninum umaftur. Tú fært eina internetadressu/leinkju, sum verður brúkt, tá tú vilt venda aftur til eina dagførda útgávu av hagtølunum.

> **DØMI**
> Vegleiðingin byggir á eitt dømi, har tú ynskir at síggja nýggjasta talið av løntakarum í vinnugreinum innan fiskivinnuna seinasta hálva árið.

## Soleiðis gert tú

Vel hesa talvuna undir “Arbeiði og lønir“ og “Løntakarar“:

AM03021 Løntakarar skiftir á vinnugrein, kyn og føðiland/ríkisborgaraskap (1985M01-2019M09)

Her velur tú vinnugreinarnar “Tils. (vinnugrein)”, “Fiskiskapur”, “Ali- og kryvjivirki», ”Fiskavøruídnaður”. Harumframt velur tú 6 teir nýggjastu mánaðirnar“.



Trýst á knøttin “Halt fram”. Nú kemur henda talvan fram:

+ Goym fyrispurning

**AM03021 Løntakarar skiftir á vinnugrein, kyn og føðiland/ríkisborgaraskap (1985M01-2019M09)**

| | 2019M04 | 2019M05 | 2019M06 | 2019M07 | 2019M08 | 2019M09 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tils. (vinnugrein) | 27.414 | 27.585 | 27.721 | 28.155 | 28.117 | 27.850 |
| Fiskiskapur | 1.499 | 1.499 | 1.486 | 1.546 | 1.522 | 1.508 |
| Ali- og kryvjivirki | 1.099 | 1.082 | 1.123 | 1.153 | 1.154 | 1.165 |
| Fiskavøruídnaður | 1.247 | 1.333 | 1.306 | 1.322 | 1.402 | 1.441 |

Goym nú fyrispurningin við at trýsta á:

+ Goym fyrispurning

Tú sært nú tríggjar møguleikar.

Vel møguleika nummar tvey, ið ger, at tú altíð fært seinastu 6 mánaðirnar:

**Dagføringar-valmøguleikar**

Hvat skal goymdi fyrispurningurin gera, um talvur verða dagførdar við nýggjum tíðarskeiðum?

- ( ) Dagfør fyrispurningin við fastari byrjunardagfesting og nýggju tíðarskeiðini
- (•) Dagfør fyrispurningin við rullandi byrjunardagfesting og sama tali av tíðarskeiðum
- ( ) Dagfør ikki fyrispurningin, men vís somu tíðarskeið sum á skíggjanum

**HENT RÁÐ**

Tú kanst eisini velja fyrsta møguleikan “Dagfør fyrispurningin við fastari byrjunardagfesting og nýggju tíðarskeiðini” og fáa lagt eitt tíðarskeið afturat, tað merkir, at tú í staðin fært 7 mánaðir næstu ferð, síðan 8 mánaðir og so framvegis.

Tú kanst eisini velja triðja møguleikan “Dagfør ikki fyrispurningin, men vís somu tíðarskeið sum á skíggjanum" og harvið ikki at fáa nýggj tíðarskeið, men neyvt somu tíðarskeið, sum víst eru á skíggjanum.

Tú ynskir at síggja neyvt somu uppseting av talvuni, sum hon sær út á skíggjanum, so vit velja:




Trýstir á:




Tú fær nú eina leinkju:




Leinkjan kann goymast til at brúka seinni.

Um tú setur leinkjuna inn í ein kaga (‘browser’), kemur talvan fram aftur. Um nýggj tøl eru komin síðani seinast, so eru tað tey nýggjastu tølini, ið verða víst.

**HENT RÁÐ**

Fyrispurningurin kann eisini goymast í øðrum sniði, sum t.d. Excel og CSV.

